# Kaj Leo: Hatta var í so hart orðað

**Hvørki Sambandsflokkurin ella floksformaðurin eru fyri deyðarevsing. Tað sigur Kaj Leo Johannesen, sum viðgongur, at hann gjørdi eitt mistak, tá hann kallaði tað "ótrúliga positivt", at Saddam Hussein fekk ta revsing, hann fekk. Men hann leggur afturat, hansara innasta kensla er, at rættvísi hevur sigrað**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Sambandsfloksflokkurin er ímóti deyðarevsing, sigur floksformaðurin*

– Tað er ongantíð positivt at taka eitt lív, men mín innasta kensla er, at rættvísið sigraði.

Tað sigur Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, eftir at Annika Sølvará, forkvinna í Amnesty International, í gjár segði seg harmast um, at Kaj Leo Johannesen hevði sagt við Sosialin, at tað var "ótrúliga positivt", at Saddam Hussein fekk ta revsing, hann fekk.

Kaj Leo Johannesen viðgongur í dag, at hann tók ov rívan til, tá hann kallaði ta jaligt, at fyrrverandi einaræðisharrin varð hongdur.

– Eg kann gott taka orðini "ótrúliga positivt" aftur. Hatta var í so hart orðað.

– Tað at eg orði meg í positivum vendingum, er ein feilur frá mær. Men mín vinkul er, at rættvísið sigraði.

– Men eg havi so ikki gjørt gjøldur burturúr Saddam Hussein, sigur Kaj Leo Johannesen og sipar til baksíðutekningina í Sosialinum í gjár, har tveir føtur sóust hanga ovast í myndini.

### Heldur fast um at rættvísi sigraði

– Men eg standi við, at rættvísi sigraði, sigur formaður Sambandsfloksins og leggur afturat, at hetta er hansara innasta, persónliga kensla. Kaj Leo Johannesen sigur, at um jóltíðir verður hann av fjølmiðlum sum kendur persónur spurdur um mangt og hvat, m.a. jóladunnur, sum hann tekur til, og at hann tí tosaði sum privatpersónur og ikki floksformaður.

– Flokkurin gongur ikki inn fyri hesum. Eg sigi eisini, at Sambandsflokkurin gongur ikki inn fyri deyðarevsing. Tað er ongantíð positivt at taka lív, sigur Kaj Leo Johannesen, og grundgevur hetta við, at tað altíð er vandi fyri, at ein ósekur verður avrættaður, og nevnir USA sum eitt dømi, har tað er komið fyri, at ósek eru tikin av døgum.

### Klivi ella deyðin

Kaj Leo Johannesen sigur, at ein kann hugleiða um, hvat er verri, at sita í einum kliva í einum væl vardum fongsli restin av lívinum ella at fáa deyðarevsing, og um pengarnir ikki høvdu verið betur farnir at breyðføtt svongum børnum fyri tær milliónirnar, eitt slíkt fongsul kostar.

Spurdur, um hetta altso er ein spurningur um pengar, sigur Kaj Leo Johannesen, at tað metir hann tó ikki, men hann undirstrikar, at tað er álvarsamt, tá tað snýr eg um brotsverk ímóti mannaættini.

Kaj Leo Johannesen sigur seg eisini skilja kenslurnar hjá fólki, hvørs næstringar eru myrd, men undirstrikar, at tað skal verða rættarskipanin og ikki kenslurnar, sum avgera revsing í okkara samfelag.

Hann samanber avrættingina av Saddam Hussein við Nurnberg-prosessina, har fleiri av teimum seku handan týningarnar undir seinna heimskríggi vóru deyðadømdir.

Spurdur, um tað var rætt at hesir eins og Saddam Hussein vóru avrættaðir, sigur Kaj Leo Johannesen:

– Tað er ongantíð positivt at taka lív.

---

# Deyðarevsing og rættvísi einki við hvørt annað at gera

**Fyrrverandi danski fólkatingslimurin og núverandi advokaturin Bjørn Elmquist metir ikki, at útsagnirnar hjá Kaj Leo Johannesen hanga saman, tá hesin sigur, at hann er ímóti deyðarevsing, men at rættvísi sigraði, tá Saddam Hussein varð dømdur í gálgan. Vit skulu ikki nýta somu metodur sum stýrið hjá Saddam Hussein, sigur Bjørn Elmquist. Heldur ikki Halgir Winther Poulsen metir, at deyðarevsing kann góðtakast**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*





Formaðurin í danska rættarpolitiska felagsskapinum og fyrrverandi radikali fólkatingslimurin, sakførarin Bjørn Elmquist, hevur í mong ár arbeitt við málum um mannarættindi. Sjálvur er hann avgjørt ímóti deyðarevsing, og metir at Saddam Hussein hevði rætt til eitt rættvíst rættarmál eins og øll onnur. Tí metir hann ikki, at tað hongur saman, tá Kaj Leo Johannesen, formaður Sambandsfloksins, sigur seg vera ímóti deyðarevsing, men samstundis sigur, at rættvísi hevur sigrað.

Bjørn Elmquist metir, at av tí at Kaj Leo Johannesen er føroyskur tinglimur og Danmark og Føroyar hava felags uttanríkispolitikk, og hann metir tað vera skeivt, at tað verður revsað við deyðadómi, eins og tað varð gjørt undir stýrinum, sum nú er fallið í Irak, tí hvat er so vunnið, spyr hann.

– Kaj Leo Johannesen hevur ikki brotið talufrælsið við at siga hetta. Men eg havi heldur ikki brotið talufrælsið við at siga, at hetta er býtt og stupid sagt av honum, sigur danski advokaturin um orðini hjá sambandsformanninum, at tað er ein sigur fyri rættvísi, at Saddam Hussein er hongdur.

– Hatta hongur ikki saman. Men tey einastu, sum kunnu revsa hann, er hansara egni flokkur og veljararnir, sigur Bjørn Elmquist.

### Rættvísi at gera upp við tað farna

Heldur ikki føroyski advokurin Halgir Winther Poulsen, sum er kønur í mannarættindum, metir, at rættvísi framt í Irak.

– Sum gamal amnestymaður og eitt sindur mentað menniskja eri eg ímóti deyðarevsing, sigur Halgir Winther Poulsen.

Hann greiðir frá, at tað er trupult at allýsa rættvisi sum hugtak, men at hetta neyvan fæst við deyðarevsing. Hann vísir á, at deyðarevsingar fóru alment fram í Evropa fyri nøkrum øldum síðani, og at hetta varð gjørt til fragd og undirhald fyri almenningin. Vit eru tó komin víðari, og avrættingar verða heldur ikki vístar alment í USA í dag, hóast fleiri statir har enn loyva deyðarevsing, sigur advokaturin.

– Rættvísi er at gera upp við tað farna, sigur Halgir Winther Poulsen.

Hann vísir á, at tað neyvan er gott fyri fólk at vera stongd inni í eitt ávíst áramál, og at hetta neyvan er uppbyggjandi og ger tey til betri menniskju. Spurdur, um hetta hinvegin er eitt slag av hevnd frá samfelagnum, sigur hann, at hetta kann vera ein kombinatión av avbyrging, um fangin verður mettur vandamikil fyri samfelagið, og hevnd frá samfelagnum.

Men deyðarevsing eru vit komin burtur frá, metir Halgir Winther Poulsen.

---

# Kallaði deyðadóm jaligan á tingsins røðarapalli

**Hóast Sambandsflokkurin er ímóti deyðarevsing, kallaði floksformaðurin tríggjar dagar eftir, at deyðadómurin varð sagdur, tað "ótrúligiani positivt", at Saddam Hussein fekk hesa revsing**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Kaj Leo Johannesen viðgongur í blaðnum í dag, at hann gjørdi eitt mistak, tá hann í samrøðu við Sosialin kallaði tað "ótrúliga positivt", at Saddam Hussein fekk ta revsing, hann fekk. Eisini sigur hann, at hann ikki segði hetta sum floksformaður, og at hetta ikki er politikkur Sambandsfloksins.

Hesa orðing hevur Kaj Leo Johannesen tó áður nýtt á tingsins røðarapalli.

Undir orðaskiftinum 8. november í fjør – 3 dagar eftir, at irakiski einaræðisharrin varð deyðadømdur - har Tórbjørn Jacobsen úr Tjóðveldisflokkinum setti løgmanni munnligan fyrispurning um kríggið í Irak, segði Kaj Leo Johannesen m.a., at "hetta rættvísið er so gott, at tað fyri ein part fer út um Føroyar, at tað hendir akkúrat nú, at tann maðurin, sum hevur havt ábyrgdina har niðri, fær tann dómin, sum hann hevur uppiborið. Tað er ótrúligani positivt, og tað vísir bara tað, at rættvísi er til fyri øll..."